# Hópur av fólki heilsaði Fiskamarknaði Føroya



*Aftast frá vinstru, standandi: Høgni Hansen, Thomas Hansen, Oskar Joensen, Kim Olsen, Pauli Poulsen, Kaj Jacobsen, Eyðfinn Olsen, Vinjard Joensen, John Nielsen og Kári Debes. Fremst frá vinstru: Malan Kjærbo, Laura Olsen, Elin Mikkelsen, Oddma Isaksen og Oddva Kristiansdóttir. Tey, sum vanta á myndini, eru Niclas Davidsen og Kristian Fr. Olsen*

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*

Í samband við, at Fiskamarknaður Føroya hevði 10 ára stovningardag, týsdagin, 24. september, skipaði felagið fyri stórari móttøku í hølum felagsins á Toftum.

Ein hópur av fólki nýttu høvi at støkka inn á gólvið millum kl. 15 og 17 at heilsa felagnum á degnum.

Starvsfólkið var í góðum hýri at taka ímóti mongu gestunum, ið fingu pinnamat, sum Verner Olsen hevði gjørt og okkurt at leska sær við.

Fólk høvdu høvi at síggja Fiskamarknaðin, ið semja er um hevur havt so ómetaliga stóran týdning fyri føroyska fiskivinnu, bæði á sjógvi og landi.

Inni á gólvinum møtti tú fyrst og fremst starvsfólkunum, bæði á Toftum og aðrastaðni, sum hava samstarv við Fiskamarknaðin, tú møtti reiðarum og skipaeigarum, og tú møtti eisini fiskakeyparum og seljarum. Umboð vóru eisini fyri fíggingarstovnar og fyritøkur, sum framleiða útgerð til fiskivinnuna.

Móttøkan byrjaði við hornatónleiki, ið altíð setir ein serstakan dám á, tá ið hann ljóðar.

### Í krepputíð

Fiskamarknaður Føroya byrjaði sítt virksemi umleið hálvt ár eftir, at hann var stovnaður. Hetta var, meðan alt tað føroyska samfelagið var í svárari kreppu.

Tað var heldur ikki lætt at reka fyritøkuna tey fyrstu árini, men seinni hevur hetta nýskapandi fyritakssemi í føroyskari fiskivinnu fótað sær og er í dag eitt rímiliga stórt og vælvirkandi arbeiðspláss.

Sosialurin fer at venda aftur til, hvønn týdning Fiskamarknaður Føroya hevur havt fyri Nes kommunu.



*Kristian Fr. Olsen, sum leiðir Fiskamarknaðin í Klaksvík og John Nielsen, stjóri.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Ragnar og Olaf Olsen, sonur og faðir. Olaf er nevndarformaður í Fiskamarknaði Føroya.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Laura Olsen við blómusamling.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Niclas Davidsen, sum vegna Fiskamarknaðin hevur ábyrgdina av landingunum.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Anfinn Olsen, reiðari á Akrabergi*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Springarar verða dripnir og etnir um allan heim

**– Eg eri ímóti at gera moralskan mun á hvali. Gera vit tað, eru vit úti á vandasjógvi í grundgevingum okkara um at drepa og gagnnýta hval, sigur Kate Sanderson**



*– Moralskt eiga vit ikki at gera mun á springarum og grindahvali, men vit eiga at lúka somu krøv til dráp og gagnnýtslu, sigur Kate Sanderson.*

HVALAVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*

Á fundinum hjá Heimsráði Hvalaveiðimanna, sum er í Norðurlandahúsinum í dag og í morgin, verður ivaleyst eisini gjørt nakað burtur úr spurninginum, um rætt er at drepa springarar ella ikki.

Kate Sanderson, sum starvast á Løgmansskrivstovuni, leggur dent á, at tað eru ikki bara føroyingar, sum drepa og eta springarar.

– Fleiri sløg eru av springarum, og allastaðni kring um í heiminum verður hesin hvalur dripin og etin. Í eitt nú Taiji í Japan fer beinleiðis veiða fram eftir springarum, og í øðrum førum er hesin hvalur ein partur av hjáveiðini hjá fiski- og útróðrarmonnum.

Kate sigur seg ikki vita ítøkiliga, hvussu japanesarar gera í Taiji, men sigur seg hava skilt, at springararnir verða riknir inn í eina bukt í landslagnum síðan stongdir inni við neti.

– Eg havi skilt, at tað er ikki altíð, at allir springararnir verða dripnir í senn, soleiðis sum vit kenna grindadrápið í Føroyum, men verða dripnir so við og við.

Hon vísir tó á, at tað er ikki ókent í Føroyum at »goyma« grindina, til líkindi eru at halda henni til.

Orsøkin til, at grindin ikki verður hildin til beinanvegin, kann vera myrkur ella streymviðurskifti, sum bíðað verður eftir.

– Jú, springarar verða dripnir og etnir aðrastaðni í heiminum í nógv størri mun, enn føroyingar halda. Fleiri strandafólk veiða springara, og hetta er t.d. eisini kent í Suðurameriku. Tað, eg veit um, verður springarin mest nýttur av teimum, sum veiða hann og ikki sum søluvøra.

Kate Sanderson sigur, at í Danmark doyggja eisini nógvar nísur í gørnunum hjá donskum fiski- og útróðrarmonnum, tí torført kann vera at halda teimum burtur.

– Eg veit um, at danir eta nísur, sum soleiðis doyggja í gørnunum, sigur hon.

### Á vandasjógvi

Kate heldur lítið um at gera moralskan mun á springarum og øðrum hvali.

– Fara føroyingar nú at gera slíkan mun á hvalum, eru vit úti á vandasjógvi, tí hetta samsvarar ikki við tær grundgevingar, vit hava fyri at gagnnýta hval.

Eitt annað er so tað, heldur hon, at vit eiga at lúka somu krøv til dráp og gagnnýtslu av springarum sum av grindahvali.

– Henda veiða skal kunna forsvarast, bæði umsitingarliga og sambært djóraverndarlógini. Hvalurin skal gagnnýtast, og springarar eiga at verða dripnir líka skjótt sum grindahvalur.

Kate Sanderson sigur, at eru tað hinvegin aðrar rationellar grundir fyri at halda aftur við veiðini, eitt nú við atliti til stovnsmeting av springarum, so er tað ein annar spurningur, ið vit kunnu kjakast um.

### Áhugaverd skrá

Fundurin hjá Heimsráði Hvalaveiðimanna í Norðurlandahúsinum byrjar við, at umboðini fyri ymisku londini í stuttum fara at greiða frá sínari veiði. Seinnapartin í dag verður tosað um heilsu, og her verða framløgur um dálkingarinnihald í hvali. Eisini verður greitt frá heilsugóðu sjófitini, sum ikki minst er góð fyri barnakonur.

Fríggjadagin verða tvey høvuðsevni. Fyrrapartin verður tosað um millumlandasamstarv, umsiting og vernd av stovnum. Her verður spurt, um tað er gjørligt at umsita hvalastovnin globalt – ella, um hann eigur at verða umsitin regionalt. Seinnapartin fríggjadagin verður tosað um millumlanda handil, innflutning og útflutning. Her verður eisini tosað um, hvørt upprunafólk ikki eiga at sleppa at selja ymiskt úr beini frá strandaðum hvalum. Sum er, sleppa hesi fólk eitt nú ikki at selja hvalabein.

Kate Sanderson verður orðstýrari á fundinum fyrrapartin fríggjadagin.

– Eg vóni, at vit á fundinum hjá Heimsráði Hvalaveiðimanna fara at hoyra nógv góð innlegg, og at gevandi kjak verður um ymisku spurningarnar, sum verða frammi, sigur hon at enda.



*– Føroyingar skulu ikki halda, at tað bara eru vit, sum drepa springarar. Strandafólk um allan heim drepa og eta springarar. Í fleiri londum eru springarar og nísur stór hjáveiða, sigur Kate Sanderson*

## Altjóða ráðstevna og veitsludøgurði

HVALAFUNDUR
*Vilmund Jacobsen*

Í dag og í morgin er Grindamannafelagið vertur fyri ráðstevnu í Heimsráði Hvalaveiðimanna (World of Whalers/WCW) í Norðurlandahúsinum í Havn.

WCW er ein alheims áhugafelagsskapur fyri hvalaveiðifólk, sum hevur til endamáls at virka fyri og verja rætt limanna til mentunarliga, samfelagsliga og búskaparliga menning, sum byggir á framhaldandi burðardygga nýtslu av havsins tilfeingi.

»Whaling for the Future« er yvirskriftin til ráðstevnuna um hvalaveiði.

Ólavur Sjúrðarberg, sum er formaður í Grindamannafelagnum, sigur, at einir 70 útlendskir luttakarar verða við, og hesir eru úr Kanada, USA, Japan, Eysturkaribisku londunum, Ný Sælandi, Grønlandi, Noregi og Íslandi.

– Hetta er ein altjóða pallur, sum viðger mál, ið snúgva seg um burðardygga nýtslu av havsins súgdjórum. Her fáa veiðifólk høvi at skifta orð um síni viðurskifti og royndir, og fyrilestrar og kjak verða um evni, ið hava felags áhuga og týdning, sigur formaðurin.

### Veitsludøgurði

Í samband við ráðstevnuna, verður í annaðkvøld kl. 20 skipað fyri veitsludøgurða í Mullers Pakkhúsi.

– Tað verður at síggja í matarskránni, at fólk koma úr ymsum heraðshornum.

Kokkar úr Føroyum, Íslandi, Grønlandi, Japan og St. Lusia í Karibiska havinum fara at gera alskyns rættir úr hvali. Hesir rættir verða borðreiddir fyri teimum 120 innbodnu gestunum, ið koma til døgurðan, sigur Ólavur.

Hetta stóra matartiltak verður samskipað av kokkunum á Hotel Hafnia, Guðmundi Guðmundsson og Kristini B. Jacobsen.

– Veitsludøgurðin samantvinnar tað heimliga og tað fremmanda, siðvenju og nýskapan innan matgerð, sigur Ólavur Sjúrðarberg.